LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister's Office

ÁRSFRÁGREIÐING UM EFTIRKANNING

LØGTINGSÁRIÐ 2024

29. juli 2024 – 28. juli 2025

Lógartænastan

Formæli

Við gildi frá løgtingsárinum 2014 skulu øll uppskot frá landsfyrisitingini eftirkannast, áðrenn tey verða løgd fyri Løgtingið ella kunngjørd. Eftirkanningin fer fram eftir ásetingunum í rundskrivi um eftirkanning og rundskrivi um lógarsmíð. Tað er lógartænastan, sum hevur ábyrgdina av eftirkanningunum.

Rundskriv um eftirkanning ásetir, at uppskot til løgtingslóg, ríkislógartilmæli, samtyktar, kunngerð, rundskriv, leiðbeining, bekendtgørelse, lovbekendtgørelse og anordningsbekendtgørelse skulu eftirkannast. Tað er ásett, hvat eftirkanningin fevnir um, mannagongdir og tíðarfreistir í samband við innlating av uppskotum og eisini, hvat lógartænastan ikki eftirkannar.

Lógartænastan eftirkannar uppskot tøkniliga og løgfrøðiliga, men ikki málfrøðiliga. Umsitingin í Løgtinginum eftirkannar uppskot løgfrøðiliga og málfrøðiliga. Tað er tí ábyrgdin hjá tí einstaka stjórnarráðnum at ansa eftir, at uppskot til løgtingslógir og kunngerðir eru málsliga lýtaleys. Hóast lógartænastan hevur til uppgávu at eftirkanna uppskot tøkniliga og løgfrøðiliga, er rættarliga ábyrgdin av málsøkjum sambært § 37 í stýrisskipanarlógini altíð hjá avvarðandi landsstýrisfólki ella løgmanni.

Lógartænastan skal hava minst fimm yrkadagar at eftirkanna eitt uppskot. Hetta eiga stjórnarráðini at hava í huga, tá tey gera tíðarætlan fyri síni uppskot. Í hesum sambandi fara vit á minna á, at uppskotini skulu sendast til eftirkanningar, áðrenn tey verða send til politiskan landsstýrisfund, men aftan á at tey hava verið til ummælis.

Í løgtingsárinum 2024 eftirkannaði lógartænastan tilsamans 216 uppskot. Lógartænastan eftirkannaði umleið 90% av uppskotunum innan 5 dagar, og 99% av uppskotunum vórðu eftirkannað innan 8 dagar.
Hetta er ellinta ársfrágreiðingin, sum verður givin út. Endamálið við útgávuni er framvegis at kunna stjórnarráðini um ymiskt viðvíkjandi lógarsmíði og at siga frá okkara royndum seinasta løgtingárið, og hvussu hetta eftirkanningarárið eftir okkara tykki hevur hepnast.

Eisini er ein partur um ummælistíðir hjá stjórnaráðunum, viðgerðina í Løgtinginum og yvirlit yvir rættarreglur, sum eru kunngjørdar í Kunngerðablaðnum.

Løgmansskrivstovan, 8. januar 2026

Nella Festirstein
Løgfrøðiligur ráðgevi

Innihaldsyvirlit

1. Løgfrøðiliga eftirkanningin....4
1.1. Ásetingar um løgfrøðiligu eftirkanningina....4
1.2 Ásetingar um eftirkanning av ríkislóggávu....5
2. Tøkniliga eftirkanningin....7
2.1. Ásetingar um tøkniligu eftirkanningina....7
2.2. Tá broytt verður í einum eftirkannaðum uppskoti....7
2.3. Uppskot sum er burturfallið í tinginum og verður sett fram aftur....7
2.4. Skabelónir....7
3. Yvirlit yvir eftirkanningar....9
3.1. Uppskot, ið skulu eftirkannast av lógartænastuni....9
3.2. Yvirlit yvir uppskotini....10
3.3. Hvat siga tølini?....15
3.4. Longd á eftirkanning....19
4. Eftirkannað uppskot og viðgerðin í Løgtinginum....21
5. Ummælisportalurin....23
5.1. Uppskot, sum eru løgd á ummælisportalin....23
5.2. Ummælisfreistir....24
5.4. Uppskot, sum ikki eru løgd á ummælisportalin....27
6. Kunngerðablaðið....28
6.1. Kunngerðing í tingárinum 2024....28

1. Løgfrøðiliga eftirkanningin

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 3.1. Lógartænastan í Løgmálaráðnum eftirkannar øll lógaruppskot, uppskot til ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar, ið landsfyrisitingin tilevnar, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið. Eftirkannað uppskot, ið eru fallin fyri freist Løgtingsins og verða løgd fram aftur, skulu eftirkannast aftur, um tey verða løgd fyri Løgtingið aftur. Frávik frá hesum kann einans gerast í samráð við løgmann.
>
> 3.2. Lógartænastan eftirkannar øll uppskot til kunngerðir, rundskriv og leiðbeiningar, ið landsfyrisitingin tilevnar. Eisini øll uppskot til kunngerðir, ið almennir stovnar, sum hava lógarheimild at kunngera kunngerðir í Kunngerðablaðnum, tilevna. Lógartænastan skal eisini eftirkanna uppskot til bekendtgørelse, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse, sum ríkismyndugleikarnir senda til ummælis hjá stjórnarráðunum.

Okkara royndir eru, at stjórnarráðini í stóran mun taka undir við viðmerkingunum, sum tey fáa til eftirkanningina. Um ráðið heldur, at okkurt er ógreitt, ella tey ikki eru samd við metingina hjá lógartænastuni, samskifta vit við ráðið um hetta, og sum oftast koma vit til eina felags fatan.

1.1. Ásetingar um løgfrøðiligu eftirkanningina

> 7.2. Løgtingslógir: Lógartænastan eftirkannar fyrst og fremst, um løgtingslógaruppskot er í samsvari við grundlóg, heimastýrislóg, stýrisskipanarlóg, tingskipan, tvørgangandi lógir, eitt nú evropeiska mannarættindasáttmálan EMRS, revsilóg, fyrisitingarlóg, løgtingslóg um alment innlit og løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, almennar rættargrundreglur og almenn rættarprinsipp.
>
> 7.3. Harumframt verður serliga hugt at heimildarásetingum til fyrisitingina, afturvirkandi virknað, pantireglum, fyrisitingarligum sektaruppskotum, heimild at áseta gjald, eftirlitsásetingum, afturtøka av løggilding, revsireglum, gildiskomureglum, skiftisreglum, kærureglum o.tíl.
>
> 7.4. Lógartænastan eftirkannar, at løgtingslógaruppskotið er greitt og skilligt fyri bæði løgtingsfólk og borgaran, at sundurbýti í lógargreinar, stykkir, kapitlar, yvirskriftir o.tíl. er hóskandi, og at bæði tær almennu og serligu viðmerkingarnar til uppskotið samsvara við sjálvan lógartekstin.
>
> 7.6. Kunngerðir: Formligu krøvini til kunngerðir eru sum ásett í rundskrivi um lógarsmíð. Lógartænastan kannar fyrst og fremst, um neyðug heimild má metast at vera fyri kunngerðini. Hvat viðvíkur innihaldinum í eftirkanningini annars verður víst til brotini um eftirkanning av løgtingslógaruppskotum.

1.2 Ásetingar um eftirkanning av ríkislóggávu

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 7.7. Ríkislógartilmæli: Formligu krøvini til ríkislógartilmæli eru sambært § 45 í tingskipanini tey somu sum til løgtingslógaruppskot sambært § 37, og sum ásett í rundskrivi um lógarsmíð. Eftirkanningin fer í høvuðsheitum fram eftir sama leisti, sum tá talan er um løgtingslógaruppskot, tó at hon ikki kann sigast at vera tann sama. Hetta er grundað á, at ríkislógartilmæli grundleggjandi víkja frá løgtingslógaruppskotum, tí talan er um lógartekst, sum longu er galdandi í Danmark, og at uppskotini í flestu førum verða gjørd av ríkismyndugleikunum.
>
> 7.8. Bekendtgørelser, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse: Sambært stýrisskipanarlógini § 48 er tað avvarðandi landsstýrisfólk, sum ummælir uppskot til kunngerðir, sum ráðharri sendir landsstýrinum við atliti at seta í gildi fyri Føroyar. Eftirkanningin av hesum fer í høvuðsheitum fram eftir sama leisti, sum tá talan er um uppskot til kunngerðir, tó at hon ikki kann sigast at vera tann sama, tí talan er ofta um kunngerðir, sum longu eru galdandi í Danmark, og at uppskotini í flestu førum verða gjørd av ríkismyndugleikunum.
>
> 7.9. Við eftirkanningini sambært nr. 7.7. og 7.8. verður serliga hugt eftir, um tað í innganginum verður víst til lóg ella kunngerð, sum er sett í gildi fyri Føroyar, og hvørjar tillagingar eru gjørdar til føroysk viðurskifti.

Ríkislóggáva er t.d. serstakar fólkatingslógir fyri Føroyar og kongligar fyriskipanir umframt danskar kunngerðir. Hesi uppskot skulu eisini sendast lógartænastuni til eftirkanningar. Donsk lógaruppskot og fyriskipanaruppskot verða sum oftast send til eftirkanningar, tá ið uppskotið er klárt at senda til landsstýrisfund, soleiðis sum ásett er í rundskrivinum um eftirkanning.

Tá ið talan er um størri lógaruppskot, mælir lógartænastan til, at danska lógaruppskotið ella fyriskipanaruppskotið verður sent lógartænastuni til undaneftirkanning, áðrenn tað verður sent til ummælis. Hetta soleiðis, at møguligar tøkniligar villur og tilvísingar til føroyska lóggávu kunnu verða rættaðar av ríkismyndugleikunum, áðrenn uppskotið verður sent út til ummælis.

Danskar kunngerðir (bekendtgørelser) skulu eisini sendast til eftirkanning. Hetta tykjast øll stjórnarráðini ikki at geva sær nóg nógv far um, tí tað kemur meira enn so fyri, at lógartænastan fyrstu ferð sær danskar kunngerðir, tá tær verða sendar til kunngering í Kunngerðablaðnum.

Vit fara enn einaferð at heita á stjórnarráðini um at minnast til at senda bekendtgørelser, lovbekendtgørelser og anordningsbekendtgørelser til eftirkanning, tá tey fáa uppskotini til ummælis frá ríkismyndugleikunum.

SERMÁL
Uppskot
landsstýrið
løgting
samtykt
løgmaður
staðfesta
Kunngerðablaðið
§
løgtings lög
JA
MÁL
FELAGSMÁL
RLT
landsstýrið
løgting
samtykt
løgmaður
staðfesta
RUB
FT
PK
Ministerium
Lovtidende + Kng. blað
§
Anordning
FT-lov
Fólkating

2. Tøkniliga eftirkanningin

2.1. Ásetingar um tøkniligu eftirkanningina

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 6.1. Tøkniliga eftirkanningin verður gjørd eftir ásetingunum í rundskrivi um lógarsmíð og skal tryggja, at uppskotið uttan trupulleikar ella ivamál kann kunngerast í Kunngerðablaðnum og samanskrivast í logir.fo.
>
> 6.2. Er avvarðandi stjórnarráð og lógartænastan ikki á einum máli um onkra viðmerking, skal stjórnarráðið venda sær til lógartænastuna hesum viðvíkjandi.
>
> 6.3. Uppskot til rundskriv og leiðbeiningar verða einans tøkniliga eftirkannað. Tó so, um okkurt eyðsýnt ivamál er, so verður hetta nevnt.

Lógartænastan eftirkannar uppskot við støði í rundskrivi um lógarsmíð. Tann 1. novembur 2025 kom dagført rundskriv um lógarsmíð í gildi.

Viðvíkjandi tí tøkniliga partinum av eftirkanningini er tað framvegis soleiðis, at onkur av stjórnarráðunum ikki geva sær nóg nógv far um, at tað er tað eftirkannaða uppskotið (skjalið), sum skal sendast Løgtinginum ella til kunngeringar.

2.2. Tá broytt verður í einum eftirkannaðum uppskoti

Tað kemur eisini fyri, at stjórnarráðini broyta uppskotið, eftir at tað hevur verið til eftirkanningar, t.d. strika ella seta nýggjar ásetingar inn. Tá hava vit eisini seinni sæð, at broytingin ikki er sett rætt upp tøkniliga. Vit mæla til, at um broytingar verða gjørdar í uppskotinum aftan á at uppskotið er eftirkannað, at stjórnarráðini senda uppskotið til endureftirkanning. Hesi uppskot kann lógartænastan ofta avgreiða skjótt, um stjórnarráðið upplýsir, hvørjar broytingar tey hava gjørt.

2.3. Uppskot, sum er burturfallið í tinginum og verður sett fram aftur

Uppskot, sum er burturfallið í Løgtinginum, t.d. tí tingsetan endaði, áðrenn uppskotið var liðugt viðgjørt, og sum landsstýrið aftur ætlar at leggja fyri Løgtingið, skal sendast til eftirkanningar eins og onnur uppskot, hóast uppskotið hevur verið eftirkannað í eini fyrru tingsetu. Tað vísir seg ofta, at smærri broytingar eru gjørdar, og at tøkniligar villur sníkja seg inn aftur í uppskotið. Hesi uppskot kann lógartænastan ofta avgreiða skjótt, um stjórnarráðið upplýsir, hvørjar broytingar tey hava gjørt.

2.4. Skabelónir

Lógartænastan hevur gjørt 9 skabelónir til: uppskot til løgtingslóg, uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg, uppskot til samtyktar, javntekst, uppskot til kunngerð, uppskot til kunngerð

um broyting í kunngerð, uppskot til ríkislógartilmæli, uppskot til rundskriv og uppskot til leiðbeiningar.

Nýggjasta útgávan er altíð at finna á breddanum hjá lógartænastuni á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni: http://www.lms.fo/fo/arbeidsoki/logarsmid/word-skabelonir-til-logarsmid/

Øll sum gera uppskot til løgtingslógir, kunngerðir, uppskot til samtyktar, rundskriv og leiðbeiningar o.a. eiga at brúka skabelónirnar, tí hetta ger, at uppskotini verða sett rætt upp tøkniliga.

3. Yvirlit yvir eftirkanningar

3.1. Uppskot, ið skulu eftirkannast av lógartænastuni

Rundskriv nr. 9000 frá 14. november 2024 um eftirkanning ásetir:

> 3.1. Lógartænastan í Løgmálaráðnum eftirkannar øll uppskot til løgtingslóg, ríkislógartilmæli og samtyktar, ið landsfyrisitingin tilevnar, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið. Eftirkannað uppskot, ið eru fallin fyri freist Løgtingsins og verða løgd fram aftur, skulu eftirkannast aftur, um tey verða løgd fyri Løgtingið aftur. Frávik frá hesum kann einans gerast sambært avtalu við løgmann.
>
> 3.2. Lógartænastan eftirkannar øll uppskot til kunngerðir, rundskriv og leiðbeiningar, ið landsfyrisitingin tilevnar. Eisini øll uppskot til kunngerðir, ið almennir stovnar, sum hava lógarheimild at kunngera kunngerðir í Kunngerðablaðnum, tilevna. Lógartænastan skal eisini eftirkanna uppskot til bekendtgørelse, lovbekendtgørelse og anordningsbekendtgørelse, sum ríkismyndugleikarnir senda til ummælis hjá stjórnarráðunum.

Í løgtingsárinum 2024 eftirkannaði lógartænastan tilsamans 216 uppskot frá øllum níggju stjórnarráðunum. Hetta eru 58 uppskot fleiri enn í tingárinum 2023.

Nøgdin av uppskotum sigur tó ikki alt, tí uppskotini kunnu vera sera ymisk bæði í longd, torleika og fjølbroytni. Soleiðis var eisini í hesum tingárinum.

Talva 1
Eftirkanningar íalt

	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022	2023	2024
Løgtingslóg	19	11	14	23	29	26	21	28	14	20	17
Kunngerð	69	74	97	88	93	76	97	76	55	51	85
Broytingarlóg	75	64	50	46	72	48	56	42	32	45	49
Broytingarkunngerð	35	36	50	65	54	39	47	54	48	22	48
Ríkislógartilmæli	27	3	11	12	6	6	8	7	10	7	8
Uppsk. til samtyktar	3	1	-	1	2	3	1	1	2	1	1
Stovnar				5	1	-	1	1		-	-
Rundskriv				6	8	2	1	3	5	1	2
Leiðbeining				2	-	2	2	-	6	-	1
Bekendtgørelse									44	10	5
Kirkjulig fyriskipan						1	-	-		-	-
Anordning										1	-
Íalt	228	189	222	248	265	202	234	212	216	158	216

3.2. Yvirlit yvir uppskotini

Í talvuni niðanfyri er yvirlit yvir uppskotini frá teimum einstøku stjórnarráðunum í løgtingsárunum 2022, 2023, og 2024.

Tá ið nýggj landsstýri koma til, er tað vanligt, at tað verða gjørdar broytingar í býtinum millum stjórnarráðini. Aftaná løgtingsvalið í 2022 vóru broytingarnar tó meira umfatandi enn vanligt, tá ið talið av stjórnarráðum fór úr 7 upp í 9. Hetta er orsøkin til, at løgtingsárið 2022 í yvirlitinum niðanfyri er býtt upp í **fyrru setu 2022 (1)**, tá ið tað vóru 7 stjórnarráð, og **seinnu setu 2022 (2)**, tá ið tað vóru 9 stjórnarráð.

Talva 2

Løgmansskrivstovan

	2022 (1)	2022 (2)	2022	2023	2024
Løgtingslóg	-	1	1	-	1
Kunngerð	-	-	-	-	1
Broytingarlóg	1	2	3	1	1
Broytingarkunngerð	-	-	-	1	-
Ríkislógartilmæli	1	-	1	1	-
Uppsk. til samtyktar	-	-	-	-	-
Rundskriv	-	-	-	-	-
Kirkjulig fyriskipan	-	-	-	-	-
Ialt	2	3	5	3	3

Talva 3

Fíggjarmálaráðið

	2022(1)	2022 (2)	2022	2023	2024
Løgtingslóg	-	4	4	3	2
Kunngerð	3	3	6	9	8
Broytingarlóg	3	9	12	10	14
Broytingarkunngerð	-	4	4	3	4
Ríkislógartilmæli	-	-	-	1	-
Uppsk. til samtyktar	-	-	-	-	-
Rundskriv	1	1	2	-	-
Leiðbeining	-	-	-	-	-
Bekendtgørelse				1	-
Anordning				1	-
Ialt	7	21	28	28	28

Talva 4

Heilsumálaráðið

	2022 (1)	2022 (2)	2022	2023	2024
Løgtingslóg	**-**	**1**	**1**	**3**	**5**
Kunngerð	**3**	**2**	**5**	**4**	**6**
Broytingarlóg	**-**	**1**	**1**	**2**	**3**
Broytingarkunngerð	**8**	**1**	**9**	**3**	**4**
Ríkislógartilmæli	**1**	**3**	**4**	**-**	**2**
Uppsk. til samtyktar	**-**	**-**	**-**	**-**	**3**
Leiðbeining	**-**	**1**	**1**	**-**	**-**
Bekendtgørelse	**-**	**-**	**-**	**4**	**-**
Íalt	**12**	**9**	**21**	**16**	**23**

Talva 5

Løgmálaráðið

	2022 (1)	2022 (2)	2022	2023	2024
Løgtingslóg	**-**	**1**	**1**	**1**	**2**
Kunngerð	**-**	**1**	**1**	**3**	**2**
Broytingarlóg	**-**	**-**	**-**	**4**	**1**
Broytingarkunngerð	**-**	**2**	**2**	**-**	**-**
Ríkislógartilmæli	**-**	**1**	**1**	**3**	**2**
Uppsk. til samtyktar	**-**	**-**	**-**		**-**
Rundskriv	**-**	**1**	**1**		**-**
Leiðbeining	**-**	**1**	**1**		**1**
Bekendtgørelse	**-**	**39**	**39**	**-**	**-**
Kirkjulig fyriskipan	**-**	**-**	**-**		**-**
Íalt	**-**	**46**	**46**	**11**	**8**

Talva 6

Umhvørvismálaráðið

	2022 (1) *	2022 (2)	2022	2023	2024
Løgtingslóg	**1**	**1**	**1**	**4**	**1**
Kunngerð	**3**	**-**	**-**	**5**	**8**
Broytingarlóg	**3**	**4**	**4**	**4**	**9**
Broytingarkunngerð	**1**	**-**	**-**	**2**	**3**
Ríkislógartilmæli	**2**	**-**	**-**	**-**	**-**
Uppsk. til samtyktar	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
Rundskriv	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
Leiðbeining	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
Bekendtgørelse	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
Kirkjulig fyriskipan	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
Ídalt	**10**	**5**	**5**	**15**	**21**

** Umhvørvis- og vinnumálaráðið*

Talva 7

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

	2022 (1) *	2022 (2)	2022	2023	2024
Løgtingslóg	**-**	**2**	**2**	**1**	**3**
Kunngerð	**3**	**3**	**3**	**5**	**25**
Broytingarlóg	**-**	**4**	**4**	**7**	**5**
Broytingarkunngerð	**1**	**6**	**6**	**4**	**11**
Ríkislógartilmæli	**-**	**2**	**2**	**2**	**4**
Uppsk. til samtyktar	**-**	**2**	**2**	**1**	**1**
Rundskriv	**-**	**-**	**-**	**-**	**1**
Leiðbeining	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
Bekendtgørelse	**-**	**4**	**4**	**4**	**2**
Kirkjulig fyriskipan	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
Ídalt	**4**	**23**	**23**	**24**	**52**

**Uttanríkis- og mentamálaráðið*

Talva 8

Barna- og útbúgvingarmálaráðið

	2022 (1)	2022 (2)	2022	2023	2024
Løgtingslóg	-	2	2	4	1
Kunngerð	-	6	6	2	13
Broytingarlóg	-	2	2	6	5
Broytingarkunngerð	-	1	1	2	12
Ríkislógartilmæli	-	-	-	-	-
Uppsk. til samtyktar	-	-	-	-	-
Rundskriv	-	1	1	-	-
Leiðbeining	-	1	1	-	-
Bekendtgørelse				1	-
Kirkjulig fyriskipan	-	-	-	-	-
Íalt	-	13	13	15	31

Talva 9

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

	2022 (1)*	2022 (2)	2022	2023	2024
Løgtingslóg	-	-	-	1	-
Kunngerð	14	9	9	17	19
Broytingarlóg	1	-	-	2	3
Broytingarkunngerð	6	8	8	6	11
Ríkislógartilmæli	-	-	-		-
Uppsk. til samtyktar	-	-	-		-
Rundskriv	-	-	-		-
Leiðbeining	-	-	-		-
Bekendtgørelse	-	-	-		-
Kirkjulig fyriskipan	-	-	-		-
Íalt	21	17	17	26	33

**Fiskimálaráðið*

Talva 10

Almanna- og mentamálaráðið

	2022 (1)*	2022 (2)	2022	2023	2024
Løgtingslóg	**-**	**2**	**2**	**3**	**2**
Kunngerð	**3**	**3**	**3**	**6**	**4**
Broytingarlóg	**1**	**2**	**2**	**9**	**8**
Broytingarkunngerð	**4**	**7**	**7**	**1**	**2**
Ríkislógartilmæli	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
Uppsk. til samtyktar	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
Leiðbeining	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
Rundskriv				**1**	**1**
Íalt	**10**	**14**	**14**	**20**	**17**

**Almannamálaráðið.*

3.3. Hvat siga tølini?

Eftirkanningar fyri løgtingsárið 2024 býttar á stjórnarráð

Mynd 1



Lógartænastan hevur í løgtingsárinum 2024 eftirkannað 216 uppskot, t.e. 58 fleiri uppskot enn í løgtingsárinum 2023, tá ið 158 uppskot vórðu eftirkannað. Talið av eftirkanningum er sostatt á sama støði sum fyri løgtingsárið 2022, tá ið talið av eftirkanningum eisini var 216.

Av teimum 216 uppskotunum vóru 17 nýggjar løgtingslógir og 49 broytingarlógir. Hetta svarar til 31% av eftirkannaðu uppskotunum.

Av teimum eftirkannaðu lógaruppskotunum átti Løgmansskrivstovan 1, Fíggjarmálaráðið 2, Heilsumálaráðið 5, Løgmálaráðið 2, Umhvørvismálaráðið 2, Uttanríkis- og vinnumálaráðið 3, Barna- og útbúgvingarmálaráðið 1 og Almanna- og mentamálaráðið 2.

Av teimum eftirkannaðu uppskotunum til broytingarlógir átti Løgmansskrivstovan 1, Fíggjarmálaráðið 14, Heilsumálaráðið 3, Løgmálaráðið 1, Umhvørvismálaráðið 9, Uttanríkis- og

vinnumálaráðið 5, Barna- og útbúgvingarmálaráðið 5, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið 3 og Almanna- og mentamálaráðið 8.

Tilsamans vórðu 85 kunngerðir og 48 broytingarkunngerðir eftirkannaðar, svarandi til 62% av eftirkannaðu uppskotunum fyri løgtingsárið 2024.

Ríkislógartilmælini vóru 8 í tali, svarandi til 4% av eftirkannaðu uppskotunum. Fimm bekendtgørelser vórðu eftirkannaðar, svarandi til 2% av eftirkannaðu uppskotunum.

Verður hugt eftir býtinum av teimum 216 eftirkannaðu uppskotunum sæst, at talið av eftirkannaðum løgtingslógum og broytingarlógum er áleið á sama støði sum undanfarna løgtingsár.

Eins og undanfarin ár eru flestu uppskotini, sum lógartænastan eftirkannar, kunngerðaruppskot. Talið av kunngerðum og broytingarkunngerðum er tó væl hægri fyri løgtingsárið 2024 enn fyri løgtingsárið 2023, tá talið av eftirkannaðum kunngerðum var 51 og talið av broytingarkunngerðum var 22. Í løgtingsárinum 2024 vóru 85 uppskot til kunngerðir og 48 uppskot til broytingerkunngerðir eftirkannaðar.

Av teimum eftirkannaðu kunngerðaruppskotunum í 2024 átti Løgmansskrivstovan 1, Fíggjarmálaráðið 12, Heilsumálaráðið 10, Løgmálaráðið 2, Umhvørvismálaráðið 11, Uttanríkis- og vinnumálaráðið 36, Barna- og útbúgvingarmálaráðið 24, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið 30 og Almanna- og mentamálaráðið 6.

Verður hugt nærri eftir tølunum sæst m.a., at talið av uppskotum til kunngerðir og broytingarkunngerðir hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum og hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum fyri løgtingsárið 2024 er økt í mun til undanfarna løgtingsár.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið átti 25 av teimum eftirkannaðu kunngerðaruppskotunum, og er talið av eftirkannaðum kunngerðum og broytingarkunngerðum sostatt økt frá 4 í løgtingsárinum 2023 til 25 í løgtingsárinum 2024. Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur upplýst, at talan í nógvum førum er um dagføring av kunngerðum og at nýggj heitir eru á útbúgvingum innan yrkisútbúgvingar. Harumframt hevur m.a. lógarbroytingin viðvíkjandi løn undir útbúgving havt árin á talið av kunngerðum hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið átti 36 av teimum eftirkannaðu kunngerðaruppskotunum. Talið av eftirkannaðum kunngerðum og broytingarkunngerðunum hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum er sostatt økt frá 9 í løgtingsárinum 2023 til 36 í løgtingsárinum 2024. Høga talið kemst av, at málsøkið sjórættur varð yvirtikið á ólavsøku í ár, og at donsku reglurnar, sum vóru galdandi frammanundan, skuldu gerast og lýsast av nýggjum á føroyskum. Flestu kunngerðirnar, 17 tilsamans, eru sostatt á sjóvinnuøkinum og snúgva seg m.a. um manningarviðurskifti, dálking frá skipum og FAS. Í sama viðfangi vórðu aðrar reglur á sjóvinnuøkinum, sum frammanundan vóru á føroyskum hondum, dagførdar. Kunngerðir annars, sum ikki snúgva seg um sjóvinnu, fevna í flestu førum um dagføring av galdandi kunngerðum, m.a. á matvøruøkinum og á aliøkinum. Tó eru eisini dagføringar á

vinnufelagsøkinum fleiri enn vanligt. Verður samanumtikið sæð burtur frá kunngerðum á sjóvinnuøkinum og havandi í huga breiða málsøkið hjá Vinnumálaráðnum, verður ikki mett, at talið av kunngerðum er óvanliga høgt, tó at tað er hægri enn í fjør.

Mynd 2



Mynd 3

Eftirkanningar fyri løgtingsárið 2024 býttar á slag av uppskoti
Uppskot til samtyktar (1)
Løgtingslóg (17)
Ríkislógartilmæli (8)
Broyting í løgtingslóg (49)
Bekendtgørelse (5)
Kunngerð (86)
Broyting í kunngerð (47)
Leiðbeining (1)
Rundskriv (2)

3.4. Longd á eftirkanning

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 4.2. Lógartænastan skal hava í minsta lagi 5 yrkadagar til eftirkanning. Í serligum førum, tá arbeiðsbyrðan hjá lógartænastuni kann væntast at vera stór, t.d. undan seinasta framløgudegi, kann roknast við, at eftirkanning tekur longri enn 5 yrkadagar. Hetta eigur landsfyrisitingin at hava í huga.

Í løgtingsárinum 2024 vórðu umleið 90% av uppskotunum eftirkannað innan fyri fimm yrkadagar, sum lógartænastan vanliga skal hava til at eftirkanna eitt uppskot.

Eins og í løgtingsárinum 2023 vóru umleið 99 % av uppskotunum eftirkannað innan átta yrkadagar. Bara í tveimum førum (0,9%) hevur eftirkanningin tikið 9 dagar ella longri.

Talva 11

Longd á eftirkanningum

	1-5 dagar		6-8 dagar		9 dagar ella longri		Ialt
Løgtingsár	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**	
2014	178	77,7%	32	14,0%	19	8,3%	**229**
2015	171	89,5%	5	2,6%	15	7,9%	**191**
2016	170	76,6%	20	9,0%	32	14,4%	**222**
2017	206	83%	22	9%	20	8%	**248**
2018	234	89%	20	7%	11	4%	**265**
2019	185	92%	9	4%	8	4%	**202**
2020	220	93%	15	6%	1	1%	**234**
2021	201	95%	9	4%	2	1%	**212**
2022	205	94,9%	8	3,7%	3	1,4%	**216**
2023	151	95,6%	4	2,5%	3	1,9%	**158**
2024	194	89,8%	20	9,3%	2	0,9%	**216**

Mynd 4



Tað sæst, at øll árini síðani 2014 vísir myndin eitt støðugt úrslit viðvíkjandi longdini á eftirkanningunum, har millum 77% og 96% av uppskotunum eru eftirkannaði innan 5 dagar, sum er freistin, sum lógartænastan skal hava til at eftirkanna uppskot. Eisini er tað gott, at tað seinastu árini einans eru nøkur heilt fá uppskot, har eftirkanningin hevur tikið 9 dagar ella longri.

4. Eftirkannað uppskot og viðgerðin í Løgtinginum

Lógartænastan hevur í løgtingsárinum 2024 eftirkannað 17 uppskot til høvuðslógir, 49 uppskot til broytingarlógir, 8 uppskot til ríkislógartilmæli og 1 uppskot til samtyktar. Hetta er tilsamans 75 uppskot.

Landsstýrið hevur í løgtingsárinum 2024 lagt 72 uppskot fyri Løgtingið, harav 60 teirra eru lógaruppskot, 10 ríkislógartilmæli og 2 uppskot til samtyktar. Av teimum 60 lógaruppskotunum vóru 14 uppskot til nýggjar løgtingslógir og 46 uppskot til broytingarlógir.

Løgtingið samtykti 13 av teimum 14 uppskotunum til nýggjar løgtingslógir, meðan 42 av teimum 46 uppskotunum til broytingarlógir vórðu samtykt. Tilsamans samtykti Løgtingið 55 av teimum 60 lógaruppskotunum hjá landsstýrinum, t.e. 91,66 %.

Løgtingið samtykti harafturat øll 10 ríkislógartilmælini og bæði uppskotini til samtyktar.

Samanumtikið samtykti Løgtingið 67 av 72 uppskotum hjá landsstýrinum, t.e. 93,1 %. Fimm uppskot fullu burtur ella vórðu tikin aftur, t.e. 6,9 %.

At tað ikki er samsvar millum talið á eftirkannaðum uppskotum og tal á uppskotum, ið vóru løgd fram í tinginum, kann koma av, at eitt eftirkannað uppskot ikki er lagt fyri Løgtingið. Tað kemur tó eisini fyri, at sama uppskot verður broytt aftan á eftirkanningina, verður sent til eftirkanningar umaftur, og at uppskotið tískil er eftirkannað meira enn eina ferð. Heldur ikki kann útihýsast, at okkurt uppskot er eftirkannað, men ikki er skrásett í yvirlitinum hjá lógartænastuni.

Mynd 5



Mynd 6


Úrslitið í Løgtinginum 2017 - 2024
100
90
80
70
60
50
40
30
20
10
0
2017
2018
2019
2020
2021
2022
2023
2024
Framlagt
Samtykt
Burturfallið
Tikið aftur

5. Ummælisportalurin

Uppskot eiga altíð at verða send til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum, og eigur tíðarfreistin at lata inn ummæli at vera 4 vikur. Henda freist eigur ikki at verða skerd, uttan so at tað er átrokandi neyðugt.

Uppskot til verklagslógir eiga altíð at verða send til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum.

Umframt at stjórnarráðini senda uppskot til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum, skulu øll uppskot hjá stjórnarráðunum eisini leggjast á ummælisportalin á heimasíðuni hjá landsstýrinum, sum øll hava atgongd til.

Ummælisportalurin er at finna á hesum leinki: http://www.foroyalandsstyri.fo/fo/kunning/uppskot-til-ummaelis/

Á heimasíðunum hjá stjórnarráðunum ber eisini til einans at síggja tey uppskot, sum viðkomandi ráð hevur til ummælis.

Okkara royndir eru, at stjórnarráðini eru meira tilvitað um at leggja fyrireikingararbeiðið við lógaruppskotum soleiðis til rættis, at tað í tíðarætlanini eisini verður sett tíð til, at uppskot kunnu verða send til ummælis, sum høvuðsregla í 4 vikur.

Enn er tað tó soleiðis, at orsakað av tíðarneyð verður ummælistíðin ofta skerd, heilt niður í nakrar fáar dagar, og í hesum førunum verða uppskotini ofta heldur ikki løgd út á almenna ummælisportalin. Hetta hevur við sær, at dygdin á lógaruppskotinum ikki gerst so góð, sum hon kundi verið.

5.1. Uppskot, sum eru løgd á ummælisportalin

Grundarlagið fyri hesum partinum av ársfrágreiðingini er ein uppteljing av teimum uppskotum, sum hava verið løgd út alment til ummælis á ummælisportalinum á heimasíðuni hjá landsstýrinum. Tað merkir, at uppskot, sum als ikki hava verið send til ummælis, ella sum einans hava verið send beinleiðis til ummælis hjá viðkomandi uttanhýsis pørtum, ikki eru við í hesi uppteljing.

Yvirlitið vísir sostatt einans ummælisfreistir fyri tey uppskot, sum hava verið á ummælisportalinum.

5.2. Ummælisfreistir

Í løgtingsárinum 2024 vórðu 157 av 216 uppskotum løgd alment til ummælis á ummælisportalinum.

Talva 12

Ummælisfreistir								
	2021		2022		2023		2024	
	Nøgd	**%**	**Nøgd**	**%**	**Nøgd**	**%**	**Nøgd**	**%**
1 - 14 dagar	27	34%	21	15%	33	29%	**45**	**29%**
15 - 27 dagar	27	34%	17	13%	39	35%	**31**	**20%**
28 dagar ella longri	25	32%	98	72%	40	36%	**81**	**51%**
Íalt	**79**	**100%**	**136**	**100%**	**112**	**100%**	**157**	**100%**

Á talvuni omanfyri sæst, at 51% av uppskotunum hava verið til ummælis í 28 dagar ella longri. Hetta er eitt framstig í mun til løgtingsárið 2023, tá ið einans 36% av uppskotunum vórðu send til ummælis í 28 dagar ella longri. Hóast framstig, so verður mett, at rúm er fyri betringum.

Fyri 20% av uppskotunum var ummælistíðin 15-27 dagar, og fyri 29% av uppskotunum var ummælistíðin millum 1-14 dagar.

Ein ummælistíð, styttri enn 14 dagar, verður als ikki mett at vera nøktandi. Ein ummælistíð upp á í minsta lagi 15 dagar má roknast sum eitt *minstamark* fyri eini rímiligari ummælistíð.

Uppskot eiga sum høvuðsregla at verða send til ummælis í 4 vikur.

Mynd 7



Stabbamyndin omanfyri vísir, at í løgtingsárinum 2024 vórðu væl fleiri uppskot send til ummælis í 28 dagar ella longri um samanborið verður við løgtingsárið 2023. Verður hugt at gongdini, sæð burtur frá løgtingsárinum 2022, sæst, at gongdin er jalig. Løgtingsárið 2022 skilir seg burturfrá undanfarnum árum og frá løgtingsárunum 2023 og 2024 við tað, at heili 72 % av uppskotunum á ummælisportalinum høvdu eina ummælistíð upp á 28 dagar ella longri.

Tað kunnu vera fleiri orsakir til, at uppskot verða send til ummælis við eini ummælisfreist, ið er styttri enn 4 vikur. Talan kann t.d. vera um skunduppskot, skattainntriv, broytingar í kvotum o.tíl.

Hóast gongdin er jalig og fleiri uppskot verða send til ummælis í 28 dagar ella longri, so verður mett, at rúm er fyri betringum og at stjórnarráðini í størri mun eiga at leggja arbeiðið at fyrireika uppskot soleiðis til rættis, at tað í tíðarætlanini eisini verður sett tíð av til, at uppskot verða send til ummælis í 4 vikur, sum meginreglan er.

Talva 13

Ummælistíð	2018	2019	2020	2021	2022	2023	2024
1 - 14 dagar	33%	29%	30%	34%	15%	29%	29%
15 - 27 dagar	33%	46%	36%	34%	13%	35%	20%
28 dagar ella longri	34%	25%	34%	32%	72%	36%	51%

Yvirlit yvir ummælistíðina hjá einstøku stjórnarráðunum út frá samlaðu tølunum:

Talva 14

Stjórnarráð	1 - 14 dagar	15 - 27 dagar	28 dagar ella longri	Hevur ikki verið til ummælis
Almanna- og mentamálaráðið	1 (2%)	3 (10%)	2 (2%)	11 (19%)
Barna- og útbúgvingarmálaráðið	5 (11%)	4 (13%)	8 (10%)	14 (24%)
Fíggjarmálaráðið	5 (11%)	13 (42%)	1 (1%)	9 (15%)
Fiskivinnu- og Samferðslumálaráðið	26 (58%)	2 (6%)	2 (2%)	3 (5%)
Heilsumálaráðið	2 (4%)	1 (3%)	17 (21%)	3 (5%)
Løgmálaráðið	0%	0%	7 (9%)	1 (2%)
Løgmansskrivstovan	0%	0%	2 (2%)	1 (2%)
Umhvørvismálaráðið	3 (7%)	4 (13%)	9 (11%)	5 (8%)
Uttanríkis- og vinnumálaráðið	3 (7%)	4 (13%)	33 (42%)	12 (20%)
Ummæli tilsamans	**45 (100%)**	**31 (100%)**	**81 (100%)**	**59 (100%)**

Øll stjórnarráððini hava í løgtingsárinum 2024 havt uppskot, sum ikki hava verið til ummælis. Eisini hava øll stjórnarráðini, uttan Løgmálaráðið og Løgmansskrivsstovan í løgtingsárinum 2024 sent uppskot til ummælis við eini freist styttri enn 14 dagar.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið stóð fyri 58% av teimum uppskotunum, sum vórðu send til ummælis við eini freist styttri enn 14 dagar. Fíggjarmálaráðið og Barna- og útbúgvingarmálaráðið stóðu fyri 11% hvør, Umhvørvismálaráðið og Uttanríkis- og vinnumálaráðið fyri 7% hvør, Heilsumálaráðið fyri 4% og Almanna- og mentamálaráðið fyri 2%.

Tilsamans eru tað 29% av øllum uppskotunum hjá stjórnaráðunum, sum hava verið til ummælis við eini freist styttri enn 14 dagar.

Í løgtingsárinum 2024 hava 20% av uppskotunum hjá øllum stjórnarráðunum verið send til ummælis við eini freist millum 15-27 dagar og 51% av uppskotunum við eini freist uppá 28 dagar ella longri. Sostatt hava tilsamans 71% av uppskotunum verið send til ummælis við eini freist longri enn 15 dagar, sum má metast at vera minsta mark fyri eina rímiliga ummælistíð.

5.4. Uppskot, sum ikki eru løgd á ummælisportalin

Sambært rundskrivinum um lógarsmíð skulu uppskot hjá landsstýrinum ikki bara sendast til ummælis hjá viðkomandi ummælispørtum; tey skulu eisini leggjast alment til ummælis á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri.

Á ummælisportalinum sæst, at í løgtingsárinum 2024 vóru 157 uppskot løgd alment til ummælis á ummælisportalinum. Í sama tíðarskeiði hevur lógartænastan eftirkannað 216 uppskot. Hetta svarar til, at 73% av øllum eftirkannaðu uppskotunum eru løgd á ummælisportalin.

Samanumtikið er, eins og undanfarna løgtingsár, talan um framstig. Í løgtingsárinum 2023 vórðu 71% av øllum eftirkannaðu uppskotunum løgd á ummælisportalin. Í løgtingsárinum 2022 var talið 63% og í løgtingsárinum 2021 var talið 37%.

6. Kunngerðablaðið

Í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 um alment kunngerðablað, sum broytt við løgtingslóg nr. 131 frá 14. desember 2012, verður álagt landsstýrinum at stíla fyri útgávu av einum almennum kunngerðablaði: Kunngerðablaðið.

Í Kunngerðablaðnum skulu allar løgtingslógir, kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur, ið landsstýrið gevur út, kunngerast.

Síðani 1. januar 2013 hevur Kunngerðablaðið einans verið givið út talgilt og ikki í pappírsútgávu sum áður. Kunngerðaportalurin gerst við hesum einasti bindandi kunngerðamiðilin til løgtingslógir, kunngerðir o.a.

Í Kunngerðablaðið A verða løgtingslógir og kunngerðir, givnar av landsstýrinum, kunngjørdar, og í Kunngerðablaðið B verða lógir og kunngerðir, ið ríkismyndugleikarnir geva út, kunngjørdar.

Tað er lógartænastan, sum hevur ábyrgd fyri at geva út Kunngerðablaðið. Kunngerðablaðið verður vanliga givið út fríggjadagar.

6.1. Kunngerðing í tingárinum 2024

Í tingárinum 2024 vóru tilsamans 238 løgtingslógir, kunngerðir, ríkislógir og bekendtgørelser o.a. kunngjørd í Kunngerðablaðnum. Av hesum vóru 209 føroyskar rættarreglur og 29 ríkislóggáva. T.v.s. at 87,8 % av kunngjørdu rættarreglunum í tingárinum 2024 eru føroyskar, meðan 12,2 % er donsk ríkislóggáva.

Talva 16

	Kunngerðir	Løgtingslógir	Lov og fyriskipan (Anordning)	Bekendtgørelse	Fíggjarlóg, fráboðanir o.a.
Almanna- og mentamálaráðið	6	6	-	-	-
Barna- og útbúgvingar-málaráðið	21	5	-	-	-
Fíggjarmálaráðið	16	13	-	-	6
Fiskuvinnu- og samferðslu-málaráðið	38	3	-	-	-
Heilsumálaráðið	11	6	1	3	-
Løgmálaráðið	3	4	2	11	1
Løgmansskrivstovan	0	-	2	-	5
Umhvørvismálaráðið	10	9	-	-	-
Uttanríkis- og vinnumálaráðið	37	9	4	6	-
Íalt	**142**	**55**	**9**	**20**	**12**

Mynd 8


238 RÆTTARREGLUR KUNNGJØRDAR Í TINGÁRINUM 2024
Kunngerðir
Løgtingslógir
Lov og fyriskipan
Bekendtgørelse
Fíggjarlóg o.a.
5%
8%
4%
23%
60%

Mynd 9


Kunngjørdar rættarreglur tingárini 2018 - 2024
160
140
120
100
80
60
40
20
0
Løgtingslóg
Kunngerð
Lov og fyriskipan
Bekendtgørelse
2018
2019
2020
2021
2022
2023
2024